# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vinnan meira í fokus

Serstakliga týsdagar men eisini allar aðrar útgávudagar fer Sosialurin miðvíst at gera meira burtur úr vinnulívinum. Vit hava fingið nógvar áheitanir frá lesarum og viðskiftafólki um at umrøða henda partin av samfelagnum meira gjølla, og hesum ynski taka vit til eftirtektar, tó at vinnan altíð hevur verið náttúrligur partur av blaðnum. Nú verður tað bara gjørt meira miðvíst, serstakliga hvønn týsdag.

Føroyskt vinnulív, ið áður mest snúði seg um fiskivinnuna, er í dag nógv meira fjøltáttað, og so við og við hava eisini aðrar vinnugreinar fingið fótin fastan. Her er bæði talan um ferðavinnu, KT-vinnu, frálandavinnu oa. Altjóðaagerðin hevur so eisini fingið fótafesti her hjá okkum, og hon er eisini við til at seta síni fingramerki á okkara vinnulív.

Alsamt fleiri føroyskar fyritøkur gerast meira internationalar. Her er við at henda ein hugburðsbroyting, ið serstakliga uppá longri sikt kann gagna øllum samfelagnum. Betraða samskiftið við útheimin eigur so eisini sín lut í hesum positivu broytingum. Alsamt fleiri føroyingar við útbúgving og royndum venda eisini heimaftur fyri at vera við til at menna vinnulívið. Hetta er so vónandi nakað, sum fer at síggjast aftur í framtíðini. Føroysk vinnulívsfólk eru eisini virknir partar av ráðstevnum og messum í útlandinum eins og vit eisini fáa vinnulívsfólk henda veg at halda ráðstevnu, fyrilestrar og skeið. Eisini tað at Føroyar gerast meira sjónligar gjøgnum umboðsstovur í útlandinum hevur sína góðu ávirkan á vinnulívið.

Uppgáva okkara er at upplýsa men eisini krittiskt at seta teir røttu spurningarnar fyri harvið at skapa grundarlag undir einum breiðum og góðum kjaki. Sosialurin leggur í dag fyri við umleið 12 vinnusíðum, har vit viðgera vinnuna breitt. Vit hava vitjað FJM í Runavík, vit hava verið á ferð við Faroe Jet, her er tilfar frá oljuráðstevnuni í Havn, vit vitja nýggju skrivstovuna hjá Sansir í Danmark, vit hava verið við til fletting, nýggjur vinnuportalur verður umrøddur, alingin er aftur á breddanum osfr. Eisini eru vit við til spennandi fyrilestur við fyrrv. amerikanska forsetanum, Bill Clinton. Tað skal vera okkara vón, at lesarar, lýsarar og viðskiftafólk annars fara at taka væl undir við hesi menning av blaðnum, sum tit eisini kunnu gerast partur av.

**Sosialurin**

## »Al magt til dem der sidder hjemme?«

**HERI SIMONSEN**



Eitt nýtt demokratiskt roknistykkið er komið fram í bløðunum seinastu tíðina. Tey sum sita heima og ikki taka lut í valum/atkvøðugreiðslum skulu teljast við! Onkur hevur boraði 60 ára gomlum valtølum, onkur annar hevur gjørt ein »Oppebørsel« burtur úr hesum. Og sigast má, at úrslitið er meiri spennandi enn ein skaldsøga úr Skálavík, meiri spennandi enn »Rolf Krage«!

**Talt skeivt!**
Tá danir atkvøddu um at fara upp í EEC í 1972, atkvøddu 63% JA og 37% NEI av teimum sum møttu upp at atkvøða. Men telja vit tey uppí, sum ikki møttu var eingin munur millum JA og NEI, og tí átti Danmark helst ikki at farið upp í EEC í 1972. Í 1994 atkvøddu 51,8% av svenskarum fyri EU-limaskapi, og 48,2% atkvøddu ímóti. Telja vit tey uppí, sum ikki møttu upp at atkvøða, var ein reiðiliga stórur meiriluti av svenskarum ímóti EU-limaskapinum. Danmark og Svøríki áttu at brúkt Evruna sum gjaldoyra í dag, sjálvt um 53% atkvøddu ímóti í Danmark, og 54% atkvøddu ímóti Evruni í Svøríki. Sjálvandi skulu tey sum ikki fóru á val teljast upp í atkvøðutalið hjá teimum í Danmark og Svøríki sum vildu hava evruna sum gjaldoyra. Tað er ikki meir enn rímiligt!

**Leirvík**
Í Leirvík atkvøddu 61% fyri Eystur Kommunu, meðan 39% atkvøddu ímóti at leggja saman við Gøtu. Men valluttøkan var sera lág. Telja vit allar sofaveljarar í Leirvík við, var ein tryggur meiriluti av leirvíkingum ímóti kommunusamanleggingini. Forsetavalið í USA í 2000 var sera spennandi. Tað var púra javnt millum Al Gore og George W. Bush. Bert ein fínteljing og rættarútsøgn í Florida gjørdi, at Bush vann. Men 40% av amerikansku veljarunum atkvøddu ikki til forsetavalið. Bush og Gore fingu bara góð 30% í part, um vit brúka Boribørsel-roknihátttin. Ergo: átti ein sofaveljari at verið amerikanskur forseti í dag. Tannlæknafelagið og HB-stuðlar verða tey fyrstu feløgini í landinum, ið fara at telja tey við, sum ikki møta upp til aðalfundin hjá áðurnevndu feløgum. Góð 13% sótu heima síðsta løgtingsval, gev sofaveljarunum 4 tingmenn, beinavegin. Tað er bæði rætt og rímiligt! Sofaveljarar hava eina stóra politiska framtíð. Nú verða tey (endiliga) tald við! Yvirføra vit Boribørsel-roknihátttin til fótbóltin gjørdust Royn og VB/Sumba nr. 1 og 2 í 1. Deild. Tey møttu ikki!

## DØTUR, ikki DØTRAR! HÁ og KÁ, ikki HÅ og KÅ!

**EYÐUN Á BORG**



DØTUR: Spell, at nógvir føroyingar siga fleiri døtrar og ikki døtur, sum er tað rætta. Ja, sjálvt foreldur, sum eiga døtur, siga døtrar!?

Í onkrari sjónvarpsskrá í bløðunum hevur hetta orðið staðið í fleiri mánaðir (ein mánaður). Er annars eingin rættlestur í bløðunum longur?

Hví munnu fólk siga døtrar og ikki døtur?

KÁ (KA):Takk fyri viðmerkingina, Sjúrður!

Hugaligt, men tú tekur heldur rívan til! Jú, eg grynni væl. Vit grynna, um vit ikki vassa ov langt út.

Fyrr í tíðini lærdu vit at siga bókstavirnar á donskum: hå og kå. Nú á døgum munnu allir skúlar læra børnini at siga bókstavirnar á føroyskum: há og ká!?

Á-ljóðið í kå verður jú úttalað a (ikki fyrra a) á norðoyamáli. Vit skulu sjálvandi varðveita bygda- og oyggjamálini.

Tískil eitur liðið KÁ Í (KA Í) ! Sera einfalt.

KÁ Í vann steypsdystirnar á Skála! KÅ Í vann ikki á Skåla!?

Á Borg á Argjum 2. oktobur 2006

Við tvítýddari malkvøðu±

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.